## Fleiri nýggir tilburðir av H1N1

Fleiri nýggir tilburðir hava seinastu dagarnar verið av H1N1, eisini nevnt svínakrími. Høgni Debes Joensen, landslækni hevur munnliga fingið at vita frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, at um vikuskiftið vórðu staðfestir fimm nýggir tilburðir, og ein aftur mánadagin. Tilburðirnir kunnu tó vera fleiri enn so, tí tá ið Føroyar 16. juli fóru í fasu 6 í tilbúgvingarætlanini, varð fráboðanarskyldan hjá læknunum um tilburðir tikin burtur.

## Aftur til Silkivegin

Ágangurin frá teimum somalisku sjórænarunum hevur havt við sær, at tað er vorðið rættiliga ótrygt og harafturat dýrt at flyta vørur millum Evropa og Kina, og tað hevur fingið alt fleiri at flyta vørurnar eftir landi. Eitt nú skipar danska flutningsfyritøkan ICT fyri flutningi úr Evropa eystur til Kasakhstan, og sambært DR er tað bara ein spurningur um tíð, til farleiðin verður longd eystur til Kina. Ein danskur umboðsmaður í Kasakhstan sigur við kringvarpið, at tann gamli Silkivegurin fær altsamt størri og størri týdning sum flutningsleið, og hann væntar sróran vøkstur tey næstu árini.

# Øll eiga at fáa kanningartilboð



**Ulrike Steuerwald, barnalækni er ikki í iva um, at allir føroyingar eiga at fáa tilboðið um at verða kannað fyri lívshættisligu sjúkuna CTD, og at tað er heilt skeivt bara at kanna øll, sum fødd eru eftir 1986. Vaksin doyggja eisini av sjúkuni**

CTD
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Lívshættisliga sjúkan CDT er ongastaðni so útbreidd sum í Føroyum, og í aðrar mátar er eisini nakað serligt við sjúkuni her. Nakrir tilburðir hava nú verið av vaksnum ungum fólkum, sum eru deyð. Tað, sum barnalæknin Ulrike Steuerwald veit um, eru øll sjúk aðrastaðni deyð longu sum børn.

Í samrøðu við Rás 2 í dag segði Ulrike Steuerwald, at tað kann hava nakað við matvanarnar, sum eru við at broytast í Føroyum. Við at leggja um til annan kost enn kjøt og fisk, fáa fólk minni av carnetine í seg. Tey, sum sjúk eru, vantar evnið carnetine í blóðinum, og hetta evnið finst í stórari nøgd bæði í kjøti og fiski. Fýra ferðir so nógv carnetine er í lambakjøti sum í heilivágnum, sigur Ulrike Steuerwald.

### Ikki so kostnaðarmikið

Hon heldur, at soleiðis sum nú sær út, eiga allir føroyingar at fáa tilboðið um at verða kannað. Hon veit ikki, hvat tilboðið frá Ríkissjúkrahúsinum verður til at kanna øll, men hon og Deildin fyri Almannaheilsu hava tosað um at senda blóðroyndir til kanningar í Týsklandi, og tað hevði ikki kostað alla verðina.

Serliga eiga tey fólk, sum hava onkran við sjúkuni í familjuni, at lata seg kanna. Tey, sum hava verið nógv sjúk sum børn, eiga eisini at verða kannað, og so tey, sum ofta hava óregluligt hjartaslag.

Ulrike Steuerwald er regluliga í Føroyum, og fyri langari tíð síðan fyrireikaði hon at koma til Føroya í næstu viku. Fríggjakvøldið 14. august klokkan 19 fer hon at hava kunnandi fund í Miðlahúsinum í Havn.

Hon upplýsti annars fyri Rás2, at ætlanin er at stovna eitt felag fyri fólk við sjúkuni. Tað heldur Ulrike Steuerwald vera eitt gott hugskot, tí fólk fáa mest burtur úr av ráðgeva hvørt annað, og haraftrat standa tey sterkari saman í felag, um tey hava eitt ynski.



*Ulrike Steuerwald heldur, at allir føroyingar eiga at fáa tilboð um at verða kannað, og at øll við onkrum við CDT-sjúkuni í familjuni, undir øllum umstøðum mugu kannast*

enn í flestu øðum londum.

Hans Atli Dahl sigur, at tað er rættiliga einfalt at kanna og granska í sjúkuni, tí hon finst í Føroyum bara í einari útgávu, so vítt hann veit.

### 25 prosent møguleiki

Um ein berari og ein ikkiberari fáa børn saman, fáa tey ikki sjúk børn. Fáa tveir berarar fýra børn, eru sannlíkindini størst fyri, at eitt barn er sjúkt, eitt er frískt, og tvey eru berarar.

Viðgerðin er einføld, tí evnið, sum teimum vantar, er ein aminosýra, ið tey kunnu fáa antin flótandi ella sum tablettir. Í Danmark verður evnið roknað sum kostískoyti, ikki sum heilivágur.

## Kommunulæknin er fyrsta stigið

**Fólk, sum ynskja at verða kannað fyri CTD, eiga at fara til kommunulæknan fyrst, sigur landslæknin**

CTD
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í seinastuni hevur nóg verið frammi um lívshættisligu sjúkuna CTD, og hetta hevur havt við sær, at fleiri fólk hava vent sær til landslæknan og biðið um at verið kannað.

Hetta fekk Høgn Debes Joensen, landslækna til at skriva til kommunulæknarnar og boðað frá, at teir eiga at taka sær av slíkum spurningum. Tey eiga fyrst av øllum at fara til egnan lækna, sum metir um, hvørt hesi fólk skulu kannast ella ikki.

Eru kommunulæknarnir í iva, kunnu teir leita leita sær ráð hjá serlæknum á Landssjúkrahúsinum, har landslæknin vísir á Fróða Joensen viðvíkjandi børnum og Bjarna á Steig viðvíkjandi vaksnum.

Landslæknin hevur mælt avvarðandi yvirlæknum á Landssjúkrahúsinum til at venda sær til klinisku genetikararnar á Ríkissjúkrahúsinum viðvíkjandi leiðreglum um, hvørji folk eiga at kannast fyri CTD - og hvussu.

